Neyðin millum pakistanarar

At veita 6 miljónum mat kostar 400 miljónir dollars

Streymurin av pakistanskum flóttarfólki yvir um markið til India heldur fram. Eftir upplýsingum frá indisku stjórnini var talið í byrjan av august 7,5 mill. og fleiri eru komin aftrat síðani.

Fyriuttan hjálp, ið veitt er gjøgnum ST og eitt amerikanskt hjálpartiltak við 20 mill. dollars verður mett, at higartil eru innkomin ella tilsøgn fingin um tilsamans 200 mill. dollars. Men hetta er bert helvtin av teimum 400 mill. dollars, sum indiska stjórnin metur tað vil kosta at veita flóttarfólki — 6 miljónum — mat í eitt hálvt ár.

Trupulleikarnir at útvega mat

Fleiri dømi eru um, hvussu striltið gongst at útvega flóttarfólkinum mat og medisin.

Bert 283.000 tons av rísi av 350.000 tonsum eru higartil rokkin fram. Av 30.000 tonsum av matolju hava teir afturfyri fingið 57.150 tons. Av 16.200 tonsum av mjólkapulvur eru higartil komin ella tilsøgn fingin um 13.561 tons.

Harumframt eru komin 19.459 tons av raps-fræi úr Canada, rís úr Japan, meðan seks skip við fullum farmi av sukri eru rokkin fram til Calcutta. Niggju onnur skip skulu í næstu framtíð uppskipa rís úr Guyana, sukur av Mauritius, turrmjólk úr Irlandi, mjólkakeks, fiskakonserves og turrmjólk úr Hollandi. Harumframt skal stovnurin World Food Programme lata bæði matolju og vegatabilska olju.

Indiski Reyði Krossur hevur við hjálparútgerð frá ymsum londum higartil hýst 3 mill. pakistanarum. Helvtin av 2.100 motorakførum (jeeps, lastvognar, anhengarar og sjúkabilar) er higartil latin, og restin skal koma seinast í novembur. Meiri enn 600 tons av medisini eru býtt út millum flóttarfólkini, og meiri skal koma.

Heimsins longsta luftbrúgv

Mong av hesum hjálpartiltøkum eru avrikað loftvegis, talan er um heimsins longstu luftbrúgv: Eini 60 charterflogfør eru send av ríkisstýrunum í Belgiu, Kanada, Vesturtýskalandi, Hollandi, Onglandi og USA. Tilsamans hava hesi flogfør flutt meiri enn 1.500 tons av útgerð gjøgnum luftina. Haraftrat koma handilsflogførini, ið ókeypis hava flutt 100 tons á vanligum flogrutum, tá ið pláss hevur verið.

Indiska stjórnin hevur verið noydd at lata pakistanska flóttarfólkinum fáa burtur av teimum matvørugoymslum, ið vanliga eru at taka til, um náttúruvannlukkur henda. Ein og hvør vaksin hevur fingið eina dagsransón uppá 800 gr. við 2.000 kaloriueindum og 53 gr. av protein-evni. Ransónin uppá hvørt barnið hevur verið helvtina av hesum.

Illa fyrikomin børn

Einahelst børnini eru illa fyri komin og hjálparleys. 1,8 mill. børn eru undir 8 ár, og helvtin av teimum undir 5 ár. Mong teirra hava álvarsligar sjúkur. Indiska stjórnin hevur tí í samvinnu við ST-stovnar sett upp eina hjálpi ætlan til 3,5 mill. dollars fyri at vinna á sjúkunum hjá børnum.

Ein av mest álvarsligu spurningunum er at veita flóttarfólkunum innivist fyri uttan klæði, teppir og eitt minstamát av køksbúnyttum. Til endan av september hevði eydnast at veita 3.336.000 fólkum innivist í tjøldbúðum til virði av 2,5 mill. dollars Presendingar eru keyptir til at seta upp tær sonevndu basha-bústaðir, har presendingarnir verða spentir yvir eina einfalda bambus-konstruktión. Har er vanliga rúm fyri fimm fólkum.

Veturin í nánd

Skjótt er eisini veturin komin til India og einahelst merkir hetta vánaligar umstøður at hýsa flóttarfólkunum í fjallaøkjum sum Assam, Maghalay og Tripura. Serlig ætlan er tí gjørd fyri at útvega klæði og teppir til tey heimleysu her. Amerikanska stjórnin hevur av sínum neyðgoymslum latið 800.000 teppir, meðan Reyði Krossur hevur útvegað 130.000 Japan, Singapore, Hongkong, Spania, Holland og Belgia eru eisini uppi í hesum hjálpartiltaki.

Øll útgerðin má flytast gjøgnum land, ið einans hevur vána vegasamband. UNICEF-grunnur Sameindu Tjóða hevur higartil útvegað 998 lastvognar, 700 jeeps, 152 sjúkabilar og 204 anhengarar til samlað virði av 7,7 mill. dollars.

Minnast de Gaulle

Á ársdegnum fyri deyða Charles de Gaulle var minningarhátíð hildin í Colombey-les-deux-Eglises, har hann búði tá hann doyði.

Kona hansara hevði biðið um, at minningarhátíðarhaldið var hildið so stillisliga sum gjørligt, men hóast hetta var fjøld av fólki komið saman í bygdini. Nógv løgdu kransar á grøv hansara.

Talið av ST-limalondum veksur

Oman á arabisku hálvoynni fekk nýliga játtað upptøku í ST, og nú eru tilsamans 131 limalond í heimssamgonguni. Millum seinast upptiknu lond eru annars Mauritius, Lesotho, lýðveldið Yemen, Qatar og Trinidad-Tobago.

Kolerasjúkan er nú bast

Hildið verður nú, at tað hevur eydnast heilsumyndugleikunum at basa kolerasjúkuni í Europu. Heimsheilsustovnurin WHO sigur frá, at beinleiðis vandi av hesi sjúku ikki longur er tilstaðar, av tí at seinnu tíðina eru teir ikki komnir framá nýggj sjúkadømi í Spaniu, har sjúkan einahelst gjørdi um seg. WHO sigur samstundis, at kolerasjúkan nú eisini ger minni og minni um seg í Norðurafrika, har hon hevur herjað illa.

Blóðugt val

Blóðugsta valstríðið sum verið hevur á Filipinunum er nú av. 11 miljónir veljarar skuldu atkvøða fyri meir enn 15.000 valevnum. Politiið hevur nú talt upp 125 deyð og 108 særd. 121 av teimum deyðu lótu lív av politiskum yvirgangsvirksemi.

Ikki sjálvmorð

Maria Callas er vorðin 20.000 frankar ríkari. Orsøkin er tann, at Radio Luxembourg saman við vikublaðnum »Noir et Blanc« høvdu borið tíðindi um, at hon hevði gjørt sjálvmorð. Ein dómstólur í Fraklandi hevur dømt, at hon skal hava 20.000 frankar frá tíðindaberarunum.

Nýggj loftleið

Í samband við at flogfelagið Lufthansa byrjaði nýggja loftleið millum Tokyo-Hong Kong-Frankfurt, skipaði flogfelagið fyri giftarmálum í flogfarinum. 20 japansk pør vóru vigd umborð á flogfarinum, meðan tað helt leiðina fram á fyrsta túrinum.


El-deyðin

Ein 39 ára gamal grikskur myndahøggari fór í el-læru fyri at læra seg, hvussu hann skuldi bera seg at við at fáa lívi av kvinnuni, hann livdi saman við, við at geva henni elektriskt stoyt.

Tað eydnaðist. Hann er nú dømdur til 17 ára fongsul.

Föroya Bjór

JÓLAØL



Bryggjað eftir gomlum uppskrivtum av besta tilfari.
Vilja tygum hava *gott* jólaøl bið um FØROYA BJÓR.

REIÐARAVIRKI
HEILSØLA
Kolonial & útgerð

HERMETIKK
TIMBURHANDIL
KLÆDNABÚÐ
SLEIPISTØÐ
SHELL-AVGREIÐSLA

DEILDIR:

SKÁLA SKIPASMIÐJA & HANDILSVIRKI, SKÁLA
Skipasmíð . Turkivirki . Handil

HANDELSHUSET PESCADERO A-S
Strandgade 27A . København K
Tlf ASTA 1830 . Telex 5290

Pf. J. F. KJØLBRO
Klaksvík . Føroyar
Telefon 5489 . Telex 20
Telegramadr.: Kjølbro Klaksvík

HAVNIN SKAL SKÍNA